# Urtagarðs-/gartnaralærlingur til Runavíkar kommunu



Søkt verður eftir lærlingi at hjálpa til at fríðka um í Runavíkar kommunu, herundir arbeiða við nýgerð og røkt av grønu økjunum.

Talan er um eitt lærupláss (handverkaraútbúgving), har lærutíðin er 4 ár. Skúlagongd er uml. eitt ár av lærutíðini og er í Danmark. Tí er neyðugt at duga væl danskt, bæði munnligt og skrivligt. Sum lærutíðin líður, fært tú størri ábyrgd og sleppir at royna teg meira sjálvstøðugt.

**Høvuðsverkevni:**

- urtagarðsarbeiðið, sum leypandi verða gjørd á økjum hjá kommununi
- røkt av blómuteigum, runnum og trøum t.v.s. lúka, planta, sláa gras o.a.
- viðlíkahaldsarbeiði og aðrar fyrifallandi uppgávur
- nýgerð og viðlíkahald av gøtum og fríøkjum
- viðlíkahald av maskinum, amboðum o.t.

**Førleikakrøv:**

- at tú - í minsta lagi - hevur koyrikort B (vanligt)
- at tú skalt kunna klára skúlagongdina á kravda støðinum
- at tú ert likamliga væl fyri

**Vit sóknast eftir lærlingi, sum**

- hevur hug at royna ymiskar uppgávur innan gartnarafakið
- hevur góð samstarvsevnir og er opin og fyrikomandi
- hevur góða heilsu og er ágrýtin

Tað er ein fyrimunur (men ikki ein treyt), um tú hevur royndir innan gartnara-/urtagarðsarbeiði ella hevur fyrsta skúlaskeið á gartnaraskúla. - Meira kann lesast um útbúgvingina á https://ju.dk/uddannelser/anlaegsgartner/

Tú fært lærlingaløn í lærutíðini sambært galdandi sáttmála millum avvarandi yrkisfelag og KAF. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til býargartnaran, Búgva Róin, tlf. 237057, ella býarverkfrøðingin Maritu S. Hentze, tlf. 237070.

Søk starvið á heimasíðu okkara www.runavik.fo/ Leys størv. Umsóknarfreistin er 15. sept. 2019, og ætlandi starvsbyrjanin er 1. okt. 2019. Talgild skjøl (t.d. pdf ella mynd) skulu viðfestast, tá søkt verður: umsókn, CV, mynd, møgulig prógv og viðmæli.

*Runavíkar kommuna er ein kommuna í menning og broyting, har tú hevur møguleika at gera tína ávirkan galdandi. Runavíkar kommuna er triðstørsta kommuna í landinum, og her búgva uml. 4100 fólk í teimum 15 bygdunum, sum hoyra til kommununa. Á hesum rakstrarøkinum - eitt spennandi og fjølbroytt arbeiðspláss, sum gartnarin og hansara fólk eru ein partur av - starvast uml. 20 starvsfólk við tilknýti til Teknisku deild.*